VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL

Nr. 184 • mikudagur • 28. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hvussu skal ella kann samfelagsins ríkidømi býtast?

**Seinasta vikan er í Danmark farin við hørðum orðaskifti um um virðir og idelogi. Tað er eitt orðaskifti sum er bæði principielt og grundleggjandi. Tað var socialministarin hjá flokkinum Venstre, Eva Kjer Hansen, sum í Jyllandsposten tann 18. september segði nakað um ójavnar í samfelagnum. Er tað ynskiligt, at stórur ella lítil munur er millum rík og fátæk í samfelagnum?**




BÚSKAPUR, ORÐASKIFTI UM VÆLFERÐ

*Rolf Guttesen*
*rg@geogr.ku.dk*



Ministarin segði: "Lad de rige blive rigere, så kan det skabe dynamik." Hesi vóru orðini, sum blivu endurgivin í pressuni og sum fólk hava skift orð um hesar dagarnar. Kanska er best at taka meira við av úttalilsinum, tí tað lýsir hennara tankagong frægari enn tann stutta útgávan. Hon legði aftrat, at hetta skal "komme hele samfundet til gode. Min socialpolitik handler om, at folk, der kan og vil, skal tjene gode penge, for det kan skabe arbejdspladser og skatteindtægter. Hvis det betyder, at skellet bliver større, gør det ikke noget."

### Partamaðurin Fogh-Rasmussen bað hana tiga

Tankagongdin hevur annars verið í floksskránni hjá Venstre, Danmarks Liberale Parti, so leingi flokkurin hevur verið til, meira enn 100 ár. Hetta er partur av liberalistisku tankagongdini "Enhver er sin egen lykkes smed."

Men Anders Fogh-Rasmussen dámdi enki hesa útmelding um sovorið principielt. Hann bað hana dementera (avsanna), tí hatta var ikki politikkurin hjá hansara stjórn. Fogh gekk ikki inn fyri størri ójavna í samfelagnum, bleiv sagt. Agtaði Kjer-Hansen ikki, bleiv hon koyrd sum socialministari alt fyri eitt!

Og Kjer-Hansen dementeraði.

Ja, hon aktaði. Nei, hon meinti tað ikki so, segði hon við pressuna.

Annars eru ikki meira enn gott 10 ár síðan Fogh sjálvur skrivaði eina bók "Fra socialstat til Minimalstat," har hann er erkaliberalistur, og heldur at staturin ella tað almenna skal spæla eina minimala rollu, sum høvundurin Tjørnehøj vísir á. Hann háar og spottar vælferðarsamfelagið, sum er bygt upp sum eitt væleydnað socialdemokratiskt projekt. Fogh skrivar millum annað, at borgarin í vælferðarsamfelagnum "er blevet reduceret til tæmmede og lydige sociale dyr." Hann skrivar, at fólkið er merkt av "en ynkelig slavenatur", og hann brúkar orð sum "trællementalitet" og "livegne" um danskaran.

### Fogh-Rasmussen hevur broytt meining

Hevði Fogh-Rasmussen so broytt meining, ella var hatta bara taktiskt politiskt spæl? Fogh og Sven Auken, sum er leiðandi socialdemokratur, hittust til hólmgongu á Århus Universitet hósdagin í seinastu viku. Fólk vóru alspent at hoyra, hvat Fogh nú av sonnum meinti um hesa sak. Fogh tosaði so leingi uttanum, at fólk í salinum at enda fóru at flenna at honum. Tí noyddist hann, sambært Politiken 29.9., at skera út í papp: "Jeg skal ikke lægge skjul på, at jeg har haft en udvikling i min personlige holdning. Jeg er nået til den erkendelse, at selv om det skal kunne betale sig at arbejde, så er det en fordel for Danmark, at der ikke er så stor social og økonomisk ulighed."

### Nú stendur hart á

Í flokkinum Venstre stendur hart á í hesum tíðum. Einfalt kann sigast, at tveir veingir eru í Venstre. Ein sum leggur dent á "folkeligt fællesskab". Ein annar, sum í dag hevur sínar røtur á handilsháskulum og er meira teoretiskur og ideologiskur liberalur. Paradoksi er, at Fogh skrivaði bókina um Minimalstaten fyri gott 10 árum síðani, sum umboð fyri handilsháskúlaveingin. Men í dag er hann knappliga á hinum veinginum, og gomlu vinirner ákæra hann fyri at yvirtaka sosialdemokratisku skránna. Nú hartar hann hesar teoretisku liberalistarnar. Tað prutlar undir lokinum í hesum flokki.

Og beint í hesum døgum er so ein nýggjur flokkur settur á stovn, Liberalisterne, sum eru útbótarar úr Venstre, sum vilja hava tað reinu linjuna. Enn ber ikki til at siga nakað um, hvørt hesin nýggi flokkur fer at gera mun, um hann kemur innum tinggátt næstu ferð. Men gamli bóndaflokkurin Venstre, Danmarks Liberale Parti, hevur fingið kapping og nakað álvarsligt at hugsa um.

### Tað stóra perspektivið

Hyggja vit, hvussu støðan er aðrastaðni í øðrum londum, sum Danmark og Norðurlond kunnu samanberast við, so síggja vit enn einaferð at hesi lond hava útviklað eitt serligt model, sum uppá mangar mátar líkist frá, hygg mynd 1.

Danmark er eitt av teimum londunum í verðini, har minsti munur er millum tey ríku og tey fátæku. Hyggja vit at disponiblu inntøkuni, so er lítil stættamunur í Danmark og hinum Norðurlondunum. Tey eru rættiliga jøvn ella homogen bæði viðvíkjandi tí búskaparliga, sosiala og polit-

*Framhald á síðu 20*